**Semja millum Heilsurøktarafelagið, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið 2025**

**1. Lønarhækkan**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2024 til 30. september 2025.

Tann 1. oktober 2024 hækkar lønin 4,75%.

**2. Nýggj skalagongd**
Galdandi frá 1. oktober 2025 er skalagongdin hendan 1, 2, 3, 5, 6 og 8.
Tann 1. oktober í 2025 flyta øll starvsfólk, sum standa á stig 4 á stig 5.
Starvsfólkini, sum flyta stig, sum víst omanfyri fáa nýggjan starvsaldursdag, sum eitur 1. oktober 2025.
Tann 1. oktober í 2025 flyta øll starvsfólk, sum standa á stig 7 á stig 8.

**3. Avtala um neyðtilbúgving í samband við arbeiðssteðg**
Partarnir hava gjørt avtalu um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg, sum tryggjar, at lív og heilsa ikki verða sett í vand. Avtalan lýsir, hvørji størv eru neyðug at manna fyri at hava eina nøktandi tilbúgving og somuleiðis skal avtalan lýsa eina skipan, sum kann loysa møguligar ósemjur um undantøk.
Avtalan verður sett í gildi 1. apríl 2025 og er hjáløgd í fylgiskjali.

**4. Arbeiðstíð § 10**
§ 10, stk. 1, nr. b), 1. reglubrot verður umorðað soleiðis:
"Fyri hvørjar 40 tímar normaltænastu í kvøld- og náttarvakt eigur starvsfólkið frí í 3 tímar. Kvøld- og náttartænasta er tænasta, sum er í tíðarskeiðnum 17.00 til 06.00. Tænasta, sum er byrjað í tíðarskeiðnum 14.00 til 17.00, har minst helvtin er aftaná kl. 17.00, skal roknast við."

**5. Barnsburðarfarloyvi § 19**
*§ 19, stk.5 verður tillagað soleiðis:*
*"Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.* Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.

**6. Eftirløn § 6 stk. 3** *"Starvsfólk, sett í starv aftaná 60 ára aldur, ið ikki ynskir upptøku í eftirlønargrunn, fær bruttolønina útgoldna"* verður strikað.

**7. Bólkaleiðari § 5**
Nýggj orðing: Bólkaleiðari/samskipari.

**8. Tímalønt starvsfólk § 22 stk.1**
***Dagføring av sáttmálanum***
Hendan orðing fellur burtur *"Frá 1. januar 2019 verður eftirløn goldin av tímaløn. Eftirlønargjaldið fylgir bundna eftirlønargjaldinum, ið er ásett í § 2, stk. 1 í eftirlønarlógini (ll. nr. 49/2013), p.t. 8%."*
Nýggj orðing: "Frá 1. januar 2024 fáa tímalønt starvsfólk eftirløn, ið er 15% av tímalønini (tó ikki av viðbótum o.l.)".

ꝑ

Lønartalvur og sáttmálar verða dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

Í Tórshavn tann 25. mars 2025

Heilsurøktarafelagið

Bingerð Fossagil, forkvinna

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Per Martin Gregersen, formaður

Anita Fuglø, leiðari

Fíggjarmálaráðið

Ruth Vang, landsstýriskvinna í Fíggjarmálum

Jan Mortensen, lønarstjóri

**Fylgiskjal 1 til avtalu um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg:**

Fylgjandi verður lagt afturat, sum nýtt (stk. 5 ella 6) í avtaluni um fráboðanarform og fráboðanarfreis hjá ávikavist KAF og FMR:

> Partarnir eru samdir um, at ein arbeiðssteðgur í ongum førum má seta lív og heilsu borgarans í vanda.
> Partarnir eru samdir um, at møgulig undantøk eiga at verða viðgjørd í góðari tíð, áðrenn arbeiðssteðgur verður lýstur, og at arbeiðssteðgur í minst møguligan mun eigur at raka fólk, ið eru óhjálpin og sum hava tørv á neyðugari heilsurøkt fyri at klára seg.

Tá arbeiðssteðgur kann seta lív og heilsu í vanda, eiga nøkur starvsfólk tí at verða undantikin arbeiðssteðgi.

1. Leiðarar kunnu ikki fara í arbeiðssteðg.
2. Leiðslan ger av í samráð við álitisfólkið, hvussu nógvum starvsfólki tørvur er á, sbr. nr. 4 niðanfyri. Tá sáttmálin millum partarnar er uppsagdur lata stovnsleiðslur og kommunur ávikavíst Fíggjarmálaráðnum ella Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fylgiskjal A, har ásett verður, hvørji starvsfólk verða undantikin møguligum arbeiðssteðgi. Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið sendir skjølini víðari til Heilsurøktarafelagið, og í seinasta lagi 1 mánað innan sáttmálin gongur út, skal semja vera millum partarnar um fylgiskjal A.
3. Starvsfólk, ið eru undantikin arbeiðssteðgi, eiga bert at átaka sær tær neyðugu uppgávurnar. Endamálið er bert at forða fyri, at vandi ikki stendst fyri lívi og heilsu borgarans. Starvsfólk mugu sostatt ikki átaka sær aðrar uppgávur.
4. Viðkomandi limir hjá Heilsurøktarafelagnum, sum fáa arbeiðsboð frá leiðsluni, hava skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálanum, sum var galdandi, áðrenn arbeiðssteðgurin var lýstur.
5. Er Heilsurøktarafelagið ikki samt við eini avgerð hjá leiðsluni sambært skjali A, kann felagið leggja málið fyri eina nevnd, sum ger av, um undantakið er neyðugt fyri at tryggja, at lív og heilsa borgarans ikki verða sett í vanda.
6. Nevndin verður mannað við trimum limum. Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið velja ein lim, og Heilsurøktarafelagið velur ein lim. Hesir báðir limirnir velja síðani forfólkið. Forfólkið skal hava viðkomandi fakligt innlit og vera óheft.
7. Til limirnir hava valt eitt forfólk sambært nr. 6, er forfólkið útnevnt av sorinskrivarinum. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar, eftir at áheitan sambært nr. 4 er komin frá Heilsurøktarafelagnum. Verður nevndin ikki samd, tekur forfólkið avgerð.
8. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna hvør sínum limi í nevndini. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna formanninum.
9. Ein avgerð sambært nr. 4 kann eftir arbeiðssteðgin leggjast fyri Fasta Gerðarættin.

BDF Pm